# Begga Niclasen 90 ár



Mánadagin 27. august verður Bergtóra Vágsheyg Niclasen, vanliga nevnd Begga, í Klaksvík 90 ár.

Begga er dóttir Joen Joensen, vanliga nevndur Jógvan Segl og Henriettu Joensen. Tey fingu 9 børn.

Begga er einasta av systkjunum, ið livir eftir. Hini systkini vóru: Andrea (f. 1907 d.1962), Jákup Pauli (Peili) (f. 1909 d. 1970), Anna Malena (f. 1911 d. 1990) , Eivind (f. 1913 d. 1915) , Jákup Øster (f. 1915 d. 1973) , Eivilda (f. 1919 d. 1985) , Ragnhild (f. 1922 d. 1990) og Asbjørn (f. 1925 d. 1981).

Í 1947 giftist Begga við Jógvani Niclasen av Fløtti í Kunoy. Jógvan doyði í 1980. Tey eiga tríggjar døtur. Tær eru: Anna, født í 1947, var gift við Mads Lützen, tey eiga synirnar Christoffer og Jógvan, sum búgva í Tórshavn. Anna doyði 5. juni í ár. Miðlingasystirin Henni, fødd í 1952, býr í Klaksvík og eigur dóttrina Ingun, sum býr við Langanes á Glyvrum. Yngst av systrunum er Jórun, fødd í 1956, sum er gift við Peri Jacobsen, tey búgva í Klaksvík.

Begga er fødd á Vágsheygnum, har foreldur hennara bygdu fyri hundrað árum síðan. Jógvan og Begga búsettust eisini á Vágsheygnum. Sostatt hevur hon altíð búð á Vágsheygnum. Seinasta árið hevur Begga tó búð á Sambýlinum á Heygnum. Føðingardagin er hon at hitta í heiminum á Vágsheygnum frá kl. 12 til 16.

**J**

## Andlát og jarðarferðir

**Poul Jacob Hansen**, eletrikari í Fuglafirði, fer til gravar úr Fuglafjarðar kirkju fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Poul Jacob, kunnu lata eina peningagávu til Fuglafjarðar kirkju. Konto í peningastovnunum.

**Martha Blaasvær Debes,** fødd Joensen, búsitandi á Argjum, andaðist í heiminum leygardagin 18. august, 74 ára gomul.

## Minningarorð um
# Hjørdis í Jansagerði



Eftir stutta sjúkralegu andaðist Hjørdis týsdagin 22. mai. Hon var 67 ára gomul, nú hon doyði.

Tað er so stutt síðani, hon var her heima og fylgdi beiggja sínum, sum doyði av somu sjúku, sum hon sjálv. Tá visti ongin, at hon sjálv var sjúk. Hon sá gott út, var tann Hjørdis, vit kendu. Glað og lívsfrísk.

Hjørdis fekk saman við okkum systkjunum ein góðan og tryggan uppvøkstur í Jansagerði. Vit vóru tvær systrar, og gjørdi tað helst sítt til, at vit báðar komu at hava eitt sera nært og inniligt samband við hvørja aðra. Aldursmunurin gjørdi, at vit ikki rættuliga komu at kennast, fyrr enn unglingaárini vóru farin afturum.

Tá Hjørdis vaks upp var vanligt at gentur, rættiliga ungar, fóru út at tæna. Soleiðis var eisini hjá henni. Hon arbeiddim.a. í »Dals«, var á støðini hjá Rikku, hoyggjaði í Mykinesi og var gongsgenta á Landssjúkrahúsinum.

Sum tjúgu ára gomul fór hon til Danmarkar, har hon fyrst arbeiddi á Hotel Hebron. Seinni fekk hon sær útbúgving sum sjúkrahjálpari og arbeiðið við gomul fólk kom at gerast hennara lívsstarv.

Frá barnsbeini av var hon tann lætta, glaða og lívsfríska smágentan. Hesi eyðkenni fylgdu henni alt lívið. Henni dámdi so væl at upptraðka. Eg minnist nógvar sjónleikir har hon spældi við. Á arbeiðsplássinum spældi hon eisini, dugdi so væl at fáa eygað á tað stuttliga. Eisini dugdi hon so væl at herma og fáa látur í. Slíkir eginleikar eru gull verdir á einum arbeiðsplássi - tað ger alt so nógv lættari. Vit, sum hava sama arbeiði, vita, at tað kann vera langt ímillum tær stuttligu løturnar.

Í 1964 giftist Hjørdis við dananum Erik, sum hon møtti í Føroyum. Tey fingu fýra børn. Í Danmark høvdu vit báðar nógv saman. Ferðaðust suðureftir og vóru niðri, tá tey elstu børnini vóru fødd. Tá var mangan gott at hava hana at stuðla seg til.

Á ellisheiminum í Vágum arbeiddu vit saman í nógv ár, og tá var bert eitt hanagleiv millum húsini. Vit báðar vóru sum sagt sera góðar. Vit kundu skemta saman, gleðast um tað lítla saman og tá trupulleikar av ymsum slag stungu seg upp, var gott hava hvørja aðra. Tú vart tann eg kundi siga alt við, eisini tað, sum ikki bleiv sagt við onnur.

Góða Hjørdis. Eg havi so ringt við at skilja, at tú ikki ert her meira. Samstundis eri eg sera takksomu fyri tey, hóast alt, nógvu ár vit fingu saman. Serliga takksom eri eg fyri at mær untist at vera hjá tær ta síðstu vikuna, tú livdi. Á sjúkrahúsinum høvdu vit nógvar góðar og inniligar løtur saman.

Sjálvt um eg syrgi teg sáran, so veit eg at Erik og børnini hjá tær syrgja enn meira um eina konu og mammu, sum gav teimum so nógv.

Hvíl í friði góða systir.

**Edith**

# Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hermund Hentze**
Hvalba

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til B8 á Landssjúkrahúsinum og tøkk til Henry D. Joensen fyri góð orð í Kapellinum.
Tøkk til Jónsvein Bech prest, berarar, sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri blómur, kransar, uppringingar og gávur.
Tøkk til tykkum, sum bakaðu og tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervið.
Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jórun, Jacob Pauli, Hartvíg, Esther, Poul Carl og Sára**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá elskaða dóttir, systir, svigarinna, mostir og fastir okkara

**Siri Davidsen**
Sørvágur

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Berg fyri troystarrík orð í kapellinum.
Tøkk til Ingu Dam fyri eina vakra, hjartanemandi jarðarferð.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og gravarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu so væl til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, gávur og uppringingar.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Heilsan*
**Foreldur og systkin við familju**

# Uni til Norra at døma



*Uni Gullfoss er úttikin til at døma í eini norskari kapping fyri kokkar, sum verður í Ålesund*

Uni Gullfoss, sum rekur Kondittaríið í miðbýnum í Havn, er úttikin til at døma í eini norskari kapping fyri kokkar, sum verður í Ålesund í Norra tann 30. august, tá tólv av teimum bestu kokkunum í Norra skulu dystast um norska meistaraheitið í kokkalist í Ålesund.

Hvør fær norska meistaraheitið "Norgesmester i Kokkekunst 2007" verður avdúkað á »Den Norske Matfestivalen«, sum verður í Ålesund frá 29. august til 2. september.

Tað er Norges Kokkemesteres Landsforening ið skipar fyri kappingini, sum hevur verið síðan 1990.

Uni er 31 ára gamal og útbúgvin kokkur, hann hevur lært bæði í Danmark og í Føroyum. Hann var við til at stovna kokkafelagið í Føroyum, og í 2005 skipaði hann fyri eini ráðstevnu í Føroyum fyri kokkar í øllum Skandinavia. Í fjør var hann í Íslandi og dømdi í eina kokkakapping. Uni sigur, at hvørt ár verður eisini skipað fyri bæði EM og VM í kokkalist.

Norges Kokkemesteres Landsforening er ein áhugafelagsskapur við limum úr øllum landinum, sum arbeiðir til frama fyri menning av kokkafakinum. Norges Kokkemesteres Landsforening eru eisini limir í WACS (Worlds Association of Cooks Society), sum er ein heimsumfatandi felagsskapur fyri kokkar.